

www.oljan.fo

**Jan Müller** 19 - 12 - 2011

# Skjótt vera oljuborgirnar fýra í tali

Í farnu viku varð skrokkurin til enn eitt frálandaskip til føroyska reiðaríið Supply Survice sjósettur í Turkalandi. Tórsborg, sum nýggja skipið fer at eita, er enn eitt av nýbrotunum hjá Justinussenmonnunum, sum frammanundan hava bygt tvey av heimsins mest framkomnu veitingarskipum til oljuvinnuna. Fyrst kom Eldborg og síðani Saeborg. Umframt Tórsborg verður eisini enn eitt útgerðarskip bygt. Tað er Sjóborg. So borgirnar verða fýra í tali, tá vit koma út á heystið 2012. Tórsborg verður nú sleipað til Noregs, har skipið verður gjørt liðugt á Havyard skipasmiðjuni í Leirvik. Eftir ætlan verður skipið liðugt í oktober. Tað triðja skipið, Sjóborg verður væntandi liðugt í apríl næsta ár. Talan er um skip av slagnum Havyard 832, sum eru sera vælumtókt og umbiðin. Supply Service hevur eisini havt hepni og dugnasemi til at fáa góðar avtalur fyri verandi skip og eru góðar vónir fyri nýggju skipini, nú tað hevur eydnast at fáa fótin innanfyri hjá stóra fyristøðufelagnum Statoil. Umframt føroyskar íleggjarar luttekur eisini norski reiðarin og vinnulívsmaðurin Per Sævik, í spennandi bátaprojektunum hjá leirvíkingum. Tey fýra frálandaskipini hjá Supply Service fara at standa í tilsamans 1,2 milliard krónum, tá tey eru liðug. Her er talan um mong arbeiðspláss hjá føroyingum, og í løtuni arbeiðir Supply Survice við eini ætlan at byggja nýggjan skrivstovunbygning í Havn. Tórsborg, sum júst er farið av bakkastokki í Turkalandi, er 86 metrar langt og 17,6 metrar breitt. Tað kann sigla 14 míl og hevur pláss fyri 2500 tonsum av last. Við skipinum vera 25 mans.